# TAÐ VERÐUR NÓGV GOTT AT BJÓÐA ÚTLENDSKU OYRUNUM



Rockbólkurin Makrel hevur framvegis møguleika at vinna sær pláss í finaluni í Prix Føroyum, har teir eisini spældu fyri tveimum árum síðani.

Mynd: Jens Kr. Vang

**Samskiparin av Prix Føroyum er sannførdur um, at ársins Prix-kapping kann lata teimum mongu útlendsku gestunum til finaluna eitt gott og spennandi innlit í føroyskan tónleik**

ÚTLANDIÐ

*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*

Samskiparin av Prix Føroyum er væl nøgdur við Prix Føroyar kappingina higartil, og tað, sum hann hevur hoyrt, ger hann fullvísan í, at tað verða nøkur góð umboð fyri føroyskan tónleik, sum koma at spæla í finaluni.

– Tað er kanska meira popptónleikur komin víðari í kappingini hesaferð enn áður, men bólkarnir í hálvfinaluni eru allir spennandi og væl spælandi. Tí stúri eg als ikki fyri tí, sum vit kunnu bjóða teimum útlendsku gestunum í finaluni, sigur Fróði Vestergaard.

## Dygd heldur í longdini

Men kanska er bólkarnir, sum eru komnir víðari, ikki so nýskapandi og leitandi, sum teir hava verið í øðrum Prixum?

– Nei, tað eru teir kanska ikki allir, men ofta duga vit ikki at síggja møguleikarnar í tí, sum vit eiga og sjálvi dáma væl. Til dømis vita øll, hvat Eyðun Nolsøe stendur fyri, og hví skuldu útlendingar ikki eisini dáma hansara tónleik.

– Tú kanst bara hyggja eftir donskum festivalum og vita, hvørji tey stóru donsku nøvnini eru har ár eftir ár. Tað eru bólkar sum Gnags, TV-2, Kim Larsen, Lars Lilholt, Sanne Salomonsen og onnur. Hetta eru øll nøvn, sum hava verið virkin í nógv ár, men sum samstundis hava nakað gott at bjóða. Tí er einki krav til góðan tónleik, at hann skal vera nýskapandi ella so øgiliga øðrvísi fyri at útlendskir gestir til Prixið skulu dáma hann.

## Nógvir góðir sangir

Fróði Vestergaard vísir eisini á, at samstundis sum útlendsk umboð fyri festivalar, spælistøð og fjølmiðlar hava lagt dent á, at føroyingar skulu royna at vera orginalir, so hava onkrir eisini sagt, at teir sakna teir góðu sangirnar eitt sindur.

– Eg haldi ikki at tað mangla góðir og fangandi sangir hesaferð. Vit vita øll, at Eyðun Nolsøe kann skriva frálíkar poppsangir, Makrel er ein bólkur í stórari framgongd, og sum virkar meira búgvin onkursvegna, og Lawetz hevur gjørt eitt ordans lop fram-eftir við sínum tónleiki, sigur samskiparin av Prixnum sum dømi um tað, sum Prixið kann bjóða í hálvfinaluni.

– Tað verða bara tríggir bólkar í finaluni, men vit hava møguleikan at bjóða øðrum bólkum við, og harvið blanda kortini eitt sindur, so vit fáa ymisk sløg av tónleiki á pallin, sigur Fróði Vestergaard.

## Kundi hugsa sær fleiri útlendingar

Fólkini, sum koma úr útlandinum til Prix Føroyar kappingina, koma mest sum øll til finaluna, sum verður hildin í Norðurlandahúsinum seint í apríl mánaði, men um samskiparin av Prixnum gjørdi av, so hevði hann eisini ynskt sær nógvar útlendskar gestir til hálvfinaluna á Tvøroyri.

– Men hetta er ein spurningur um fígging, tí vit hava ikki pengar til at bjóða nógvum útlendingum til bæði hálvfinaluna og finaluna, og tí koma tey flestu til finaluna. Eg kundi ynskt mær, at vit eisini kundu havt útlendsk umboð til kappingina í Trongisvági, sigur hann.

– Tað er trupult at fáa stuðul, og tí er tað avmarkað, hvussu nógvar ferðir, vit kunnu verða við til at gjalda. Vit plaga at gjalda ein part av ferðingini og uppihaldinum í Føroyum, og tað kostar nakrar túsund krónur fyri hvønn gest, men tað eru pengar, sum eru givnir sera væl út, tí vit fáa nógv aftur fyri hesar vitjanir.

– Tí skilji eg ikki rættiliga, at nú vit tosa so nógv um at gera tónleik til eina vinnu, at vit ikki kunnu brúka meira pengar til at fáa útlendskar lykilpersónar til Føroya at lurta eftir føroyskum tónleiki, sigur Fróði Vestergaard.

## NÓGVIR VINNINGAR

- Høvuðsvinningurin til Prix Føroyar 2005 er ein vika í danska Lundgaard Studios. Mentamálaráðið og Atlantic Airways lata vinningin.
- Listastevna Føroya - august 2006 - bjóðar vinnaranum av Prix Føroyar kappingini at spæla á Listastevnuni 2006.
- Jelling Musikfestival saman við Atlantic Airways - mai 2005 - velur í minsta lagi ein bólk ella einstakling frá Atlantic Music Event.
- NIBE-Festival saman við Atlantic Airways - juni 2005 - velur í minsta lagi ein bólk ella einstakling frá Atlantic Music Event.
- Ólavsøkukonsertin 2005 - Vinnarin og ein bólkur frá hálvfinaluni í Suðuroynni verða tveir av bólkunum á Ólavsøkukonsertini.
- G-Festivalurin - velur fyrst ein bólk frá hálvfinaluni í Suðuroy og minst ein Prix-bólk frá Atlantic Music Event.
- Musikhuset VEGA í Keypmannahavn bjóðar minst einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla í VEGA í 2005.
- Summarfestivalurin 2005 - velur ein bólk frá hálvfinaluni í Suðuroy og minst ein bólk frá Atlantic Music Event.
- Nipiaa Rockfestival í Aasiaat í Grønlandi - august 2005 - bjóðar í minsta lagi einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla á rockfestivalinum 2005.
- AIRWAVES í Íslandi - oktober 2005. Møguleiki verður latin upp fyri at fáa føroyskar bólkar at spæla á Airwaves 2005.
- »Peace & Love Festivalurin« í Svøríki bjóðar minst einum bólki ella einstaklingi frá Atlantic Music Event at spæla í Svøríki summarið í 2005.